Poul F. Guttesen:

# Ph.d. prógv í gudfrøði

**23. juni 2006 fekk Poul F. Guttesen handað ph.d.-prógv í gudfrøði við lærda háskúlan í St. Andrews í Skotlandi**

Poul er havnarmaður, sonur Maritu og Leivur F. Guttesen. Eftir at hava lisið gudfrøði í USA og Kanada fór Poul undir eina ph.d.-granskingarætlan á St. Andrews. Ritgerðin viðgjørdi Jürgen Moltmann, ein av týdningarmiklastu gudfrøðingunum í Týsklandi eftir 2. heimsbardaga. Í granskingini útgreinaði Poul týdningin av "ríki Guds" sum eitt grundleggjandi hugtak í gudfrøði Moltmanns og samanbar hetta við líknandi hugtøk í Opinberingini. Ein grundleggjandi táttur í ritgerðini er, hvussu vónin um ríki Guds ávirkar heims- og lívsáskoðan menniskjans.



*23. juni 2006 fekk Poul F. Guttesen handað ph.d.-prógv í gudfrøði við lærda háskúlan í St. Andrews í Skotlandi.*

Ritgerðina vardi Poul síðsta heyst, men sjálv próvhandanin var í vár. University of St. Andrews er elsti lærdi háskúlin í Skotlandi. Próvhandanin var sera hátíðarlig og merkt av aldargomlum siðum, sum hava sín uppruna langt aftur í miðøldina.

Poul undirvísur nú í gudfrøði, serliga í Nýggja Testamenti, á Schloss Mittersill í Eysturríki.

Leygardagin 9. september frá kl. 14-18 undirvísur Poul Guttesen í 1. Jóh. brævi í hølunum hjá samkomuni Lívdini á Brekku 3 í Hoyvík. Hann fer at nema við evnir, so sum hvussu 1. Jóh. bræv lýsir lívið í ljósi og kærleika Guds.

## Andlát og jarðarferðir

**John(jon) Dánjal Pauli Ludvig**, vanliga nevndur Jobburin, úr **Vági**, búsitandi í **Hanstholm**, andaðist í Heiminum leygardagin 2. september, 56 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Ræhr kirkju við Hanstholm mikudagin 6. september klokkan 13.

Kistan við **Sannu Lisberg, Vágur**, fer suður við Smyrli mánadagin 4.september kl. 10. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju mikudagin kl. 12.30. Tey, ið ynskja at minnast Sannu Lisberg, kunnu latað Føroya Felag móti Krabbameini eina peningagávu, konto í peningastovnunum.

**Marjun Askam**, búsitandi í **Løgstør**, andaðist 31 august á Sygehussyd Ålborg, 72 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Nesborg Kirke mikudagin kl. 13.

Lana Olsen:

# Prógv sum læknaskrivari

Fríggjadagin 1. september 2006 var móttøka á Landssjúkrahúsinum, í sambandi við at Lana Olsen fekk handað prógv sum læknaskrivari.

Lana, sum er ættað av Sandi, byrjaði sína útbúgving sum læknaskrivari 1. september 2004.

Útbúgvingin sum læknaskrivari tekur tvey ár, treytað av at næmingarnir hava hægri handilsskúlaprógv. Handilsskúlaprógvið skulu næmingarnir hava, hóast teir hava students- ella HF-prógv.

Undirvísingin er skipað soleiðis, at næmingarnir fara til Danmarkar á skúla fimm ferðir. Seinastu ferðina skulu teir verja eina verkætlan saman við próvtøkuni.

Útbúgvingarleiðari er Sæunn Ólavsdóttir Hansen.



*Fríggjadagin 1. september 2006 var móttøka á Landssjúkrahúsinum, í sambandi við at Lana Olsen fekk handað prógv sum læknaskrivari*

# Thue Christiansen í Tilhaldinum

Frá 11. til 15. september skipar Tilhaldið í Tórsgøtu fyri skeiði í horn- og træhandverki. Tað er kendi grønlendski listamaðurin og politikkarin Thue Christiansen, sum undirvísir á skeiðinum.

Thue Christiansen er 66 ára gamal. Hann er útbúgvin lærari og hevur arbeitt sum lærari bæði í Danmark og mong ár í Grønlandi.

Hann er eisini ein kendur politikari, og var hann t.d. landsstýrismaður í fyrsta grønlendska landstýrinum, eftir at Grønland fekk heimastýri í 1979.

Sum listamaður hevur hann t.d. teknað grønlendska flaggið og gjørt búmerkir til fleiri fyritøkur og stovnar. Hann er giftur Katrin Jensen sum er donsk, men av føroyskari ætt.

Skeiðið verður hildið í Tilhaldið í Tórsgøtu – allar dagarnar frá kl. 9-16. Tilmelding er á telefon 316491, kostnaðurin er 1.850 krónur.



*Kendi grønlendski listamaðurin og politikkarin Thue Christiansen undirvísir á skeiði í Tilhaldinum í Tórsgøtu*

Keypssamtøkan í Dr. Jakobsensgøtu

FK í Dr. Jakobsensgøtu sóknast eftir

**Varaleiðara**

at byrja 1. oktober ella eftir nærri avtalu

**Vit kunnu bjóða tær**

- eitt spennandi starv, har tú fært høvi at vísa tíni evnir og hugflog
- ein handil við góðum rakstri og spennandi, lívligum umhvørvi
- Løn eftir avtalu og m.a. førleika

**Vit vænta av tær**

- at tú kanst hava ábyrgd av, at handilin altíð er til reiðar at taka móti kundum
- kanst skipa fyri góðari kundarøkt
- at tær dámar at taka av avbjóðingum og hava nógv at gera
- at tú ert sjálvstøðug/ur, ábyrgdarfull/ur og kanst skifta millum arbeiðsuppgávurnar í handlinum
- at tú hevur kunnleika til handilsyrkið

Meira fæst at vita um starvið við at støkka inn á gólvið ella ringja á tel 312320 el. 217593 og spyrja eftir leiðaranum Bo Møller

Umsókn skal vera okkum í hendi innan 6. september, ella skjótast gjørligt

**Keypssamtøkan**
í Dr. Jakobsensgøtu
Postsmoga 349
FO-110 Tórshavn
Tel 31 13 20

Att.: Bo Møller
Fartel 217593
bm@fk.fo